# Funkur í RVG – skráset egna fráveru og send rokningar sjálvvirkandi víðari í tíðarskeiðinum

Í hesum partinum verður greitt frá, hvussu rokningar sjálvvirkandi kunnu verða sendar øðrum at avgreiða. Tað kann vera serliga hent, tá ið talan er um ætlaða fráveru í fleiri dagar.

1. Trýst á **Stillingar**




2. Trýst á kalendaraímyndina, og vel dagin, frá tí rokningar skulu verða sendar øðrum brúkara



3. Trýst á kalendaraímyndina, og vel dagin, tá ið rokningar ikki longur skulu verða sendar øðrum brúkara. Verður eingin dagur valdur, heldur skipanin áfram at senda rokningar víðari.




4. Vel síðani tann, sum rokningarnar (uppgávurnar) skulu verða sendar. Tað ber bara til at senda fólki á sama stovni rokningar.



5. Trýst á **Skráset** fráveru fyri at skráseta.




6. Til ber altíð at fara inn á **Stillingar** aftur at stovna nýggja fráveru, broyta og strika skrásetta fráveru.

